# Tepurt tap ímóti Skotlandi

**Í yvirtíðini bjargaði skotski málverjin framúr væl, tá ein av hansara egnu snýtti hann fullkomuliga**

U–19 EM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*

Undan fráferðini til Slovenia var venjarin hjá U–19 fótbóltslandsliðnum, Jógvan Martin Olsen, ikki heilt álvuligur við støðuna. Fleiri av føstu monnunum vóru ikki tøkir, og aðrir høvdu av ymsum orsøkum ikki havt møguleikan at fyrireika seg so væl, sum tað hevði verið ynskiligt.

Fyrrapartin mikudagin tapti føroyska liðið 2–1 ímóti Skotlandi. Føroyska ferðalagið harmaðist um, at tað ikki eydnaðist at fáa javnleik.

Í yvirtíðini stakk Áki L. Hansen djúpan bólt í vinstru til Hjalgrím Elttør, sum kom inn í brotsteigin. Aftaná kann tosast um, hvussu tað hevði tørnað út, um hann hevði valt at flyta seg framum verjuspælaran, ið kom stundandi aftaná honum, og ivaleyst var á veg at gera brotsspark. Hjalgrím sá, at innskifti Rókur F. Jespersen var leysur mitt fyri málinum, tvørbóltinum bilti einki, men ein av verjumonnunum hjá Skotlandi ofraði seg. Tað var um reppið, at hann beindi bóltinum í sítt egna mál, men málverjin megnaði í knappari vend at snara sær og sláa bóltin á stólpan, og so var møguleikin at javna burtur.



*Hjalgrím Elttør er ein av teimum royndum leikarunum á føroyska U19-landsliðnum*

## Einki at finnast at

Jógvan Martin Olsen var væl nøgdur við avrikið hjá sínum monnum:

– Skotarnir høvdu í 2. hálvleiki bóltin eitt sindur meiri enn okkara. Í fyrra umfarinum var eingin munur á. Teir spældu typiskan bretskan fótbólt við longum og høgum sendingum, og miðverjarnir hjá okkum, Jón Rói Jacobsen og Atli Danielsen, høvdu gott tak á tí. Á miðvøllinum megnaðu vit væl smáspælið og at varðveita bóltin leingi, greiðir venjarin frá.

– Í síðstu viku fingu vit javnleik við U–17 landsliðnum ímóti Wales. Eg haldi, at vit ímóti Skotlandi mikudagin høvdu javnleikin meiri uppibornan, sigur venjarin, sum rósar øllum spælarunum fyri góðan hugburð og gott arbeiði.

## Málini

Skotland kom á odda, tá eitt korter var farið. Teir spældu seg ígjøgnum í høgru, onkur av føroysku spælarunum var óheppin og gleið, og innleggið til handara stólpan varð stýrt í málið.

Tá seinna umfarið var tólv minuttir gamalt, javnaðu føroyingarnir. Eftir uppspæl í høgru smekkaði Bjarni Jørgensen til úr høgru, málverjin hálvbjargaði, og Jann Ingi Petersen var fyrstur á returinum.

Tað restaðu tjúgu minuttir, tá Skotland fekk sigursmálið. Uppspælið var í vinstru, og so fluktaði ein úr 25 metrum og upp í handara málhornið.

– Hatta slagið av máli skorar ein spælari ikki ofta í einum longum fótbóltslívi, heldur Jógvan Martin Olsen.

Annars vóru ikki so nógvir málmøguleikar. Pól N. Joensen bjargaði tvær ferðir góðum royndum frá skotunum. Eftir fríspæling frá Jón Róa Jacobsen var Heini í Skorini leysur, men skotski málverjin bjargaði framúr væl, og tá Símun Joensen stakk fram ímillum til Hjalgrím Elttør, varð hann blokeraður, akkurát áðrenn hann úr góðari støðu skuldi royna ímóti málinum.

Tá Rókur Jespersen var komin inn, spældi føroyska liðið við trimum álopsmonnum, men tað eydnaðist ikki at koma nærri útjavnandi málinum, enn at bólturin fór í stólpan.

## Torførar uppgávur

Seinnapartin mikudagin vann Slovenia 3–2 á Grikkalandi, eftir at støðan í hálvleikinum hevði verið 1–1.

– Eg sá tann dystin, og tað er greitt, at bæði hesi liðini eru betri fyri enn Skotland. Seinnapartin fríggjadagin skulu vit spæla ímóti Slovenia, og sunnudagin skulu vit spæla ímóti Grikkalandi. Eg rokni við, at tað verða ógvuliga torførir dystir, heldur Jógvan Martin Olsen.

Mikudagin koyrdi føroyska liðið ein hálvan tíma frá gistingarhúsinum og til dystarvøllin. Í dag og sunnudagin skulu teir koyra í tveir tímar. Býurin, sum teir skulu spæla í, eitur Kidricevo.

Føroyska liðið mikudagin: Pól N. Joensen, HB – Áki Petersen, ÍF, Jón Rói Jacobsen, HB, Atli Danielsen, KÍ, Áki L. Hansen, NSÍ (Bárður Christiansen, HB, 85.)– Gilli Haraldsen, Frederikshavn, Jann Ingi Petersen, B68, Símun Joensen, KÍ (Kaj Ennigarð, GÍ, 68.), Heini í Skorini, B36 (Rókur F. Jespersen, HB, 87.) – Bjarni Jørgensen, HB, Hjalgrím Elttør, KÍ

# FCK víðari í steypakappingini

**Nýggi álopsspælarin Peter Møller avgjørdi dystin, sum sendi FCK í fjórðingsfinalurnar**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Mikukvøldið spældi FC Keypmannahavn í donsku steypakappingini, sum verður rópt DONG Cup.

Dysturin var í Parkini, og Viborg, sum í vikuni gav venjara sínum sekkin, vitjaði. Fyrsti dysturin hjá nýggja Viborg-venjaranum endaði tó við ósigri, tí FCK vann 2-0.

Tá ein hálvur tími var eftir at spæla, varð nýggi álopsspælarin hjá FCK, Peter Møller, sendur á vøllin. Dysturin hevði verið tamur, men tað kom eitt sindur meira lív í, eftir at Møller var komin á vøllin.

Løtu seinni skoraði Morten Bisgaard til 1-0, og fáar minuttir seinni avgjørdi Peter Møller dystin, tá hann skoraði sítt fyrsta mál fyri FCK.

## OB tók øll á bóli

FCK er nú komið í fjórðingsfinalurnar í steypakappingini.

Mest óvæntaða úrslitið mikukvøldið kom í Brøndby, har OB úr Odense vóru á vitjan.

Hóast Brøndby tykist hava beina kós móti gullinum í landskappingini, so verður tað ikki ein gylt steypakapping í ár. OB vann púra óvæntað 4-2, og so er Brøndby úti av steypakappingini.

Meðan Brøndby hevur sett sín dám á landskappingina í Danmark, hava teir ikki havt somu eydnuna í steypakappingini.

# FM í triathlon

**Sunnudagin 4. november verður FM-kapping í triathlon**

TRIATHLON
*Eyðun Klakstein*

Um 10 dagar verður skipað fyri FM í triatlon. Kappingin verður í Havn, og kappast verður á trimum ymiskum teinum.

OL-teinurin er 1500 metrar svimjing, 40 km. súkkling og 10 km. renning. Sprint triathlon er 750 metrar svimjing, 20 km. súkkling og 5 km. renning. 1/12 triathlon er 300 m. svimjing, 15 km. súkkling og 3,8 km. renning.

Svimjast skal í svimjihøllini í Gundadali, og tá luttakararnir eru komnir úr vatninum, ræður um at skunda sær til skúllurnar. Á teimum longru teinunum verður súkklað til Kaldbaks og aftur til Havnar, har málið er við Plantusøluna.

Í 1/12 triathlon verður súkklað frá Plantusøluni til Føroya Sparikassa og aftur. Hesin teinurin er 5 kilometrar og skal tí súkklast tríggjar ferðir.

Renningin verður frá Plantusøluni til Føroya Sparikassa og aftur. Tó renna tey, ið taka lut í 1/12 triathlon, fýra ferðir runt um Plantusøluna.

Tilmelding kann gerast fram til leygardagin 3. november. Tað kann ringjast til Evald Rasmussen á tlf. 316552 ella Gunnar Dahl-Olsen á 319030.






Leikhúsið Gríma

sýnir leikin

**Fótur í hosu**

eftir Súsonnu & Hans Tórgarð

leikstjórn Hans Tórgarð

á Meiarínum

| | | |
|---|---|---|
| **Leygarkvøldið** | **27.10.2001** | **kl. 18.00** |
| **Sunnukvøldið** | **28.10.2001** | **kl. 18.00** |
| **Týskvøldið** | **30.10.2001** | **kl. 20.00** |
| **mikukvøldið** | **31.10.2001** | **kl. 20.00** |

Atgongumerki á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3246
Navn: Sp/f J. E. Export
Adressa: c/o Jens Eli Ellefsen, 370 Miðvágur
Kommuna: Miðvágs Kommuna
Stovningardato: 18.10.2001
Viðtøkudato: 18.10.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Sp/f Pronto, 370 Miðvágur (Sp/f 2621)
Nevnd: Sonnfinnur Ellefsen, 370 Miðvágur (formaður) og Jens Eli Højgaard Ellefsen, 370 Miðvágur.
Stjórn: Jens Eli Højgaard Ellefsen, 370 Miðvágur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 18.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, framleiðslu, inn- og útflutning og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 24. oktober 2001

Kristin Balle


www.provita.fo

**Fosturtøka... og hvat so?**

Evnisdagur um fosturtøku og tess avleiðingar við Elisabeth&Carl Sukkot.

*Skrá:*

- ***Mamman** - avleiðingar*
- ***Familjan** - avleiðingar*
- *Hvat kunnu **vit** gera?*

Elisabeth og Carl Sukkot eru úr Danmark og eru sera virkin í fosturtøkuspurninginum. Hon er sjúkrasystir og hann er lærari í kunningartøkni.

| | |
|---|---|
| Dagur: | Leygardagin **27. okt.** 2001. |
| Stað: | HF- & Studentaskúlin á Kambsdali. |
| Tíð: | **Kl. 9.30** til kl. 15.00. |
| Kostnaður: | Ókeypis - **øll eru vælkomin.** |
| Til matna: | Ókeypis døgverði, kaffi og køkur. |

Føroya Pro Vita er ein felagskapur sum hevur til endamáls, at verja mannalív, heilt frá gitnaði til natúrligan deyða. Felagið virkar fyri at verja ófødda barni ímóti fosturdrápi og fyri at finna lívsjáttandi loysnir fyri tey, sum koma í trongstøðu vegna barnsburð. Felagið er óheft polittiskt og óheft av kristiligum trúarbólkum, men byggir á kristnu lívs- og menniskjaáskoðanina.



**DART**

FM FOR HOLD. (A+B)

SOM NOGET NYT I ÅR VIL VI LAVE BÅDE EN A-RÆKKE ("DE PROFESSIONELLE"), SAMT EN B-RÆKKE SOM SAGTENS KAN VÆRE ET FIRMAHOLD.
DER SKAL VÆRE 3 MAND M/K PÅ HVERT HOLD, OG DET ER TILLADT AT SKIFTE UD MED EN RESERVE IMELLEM HVER KAMP.
MEDENS A-RÆKKEN TÆNKER LIDT MERE PÅ AT VINDE FM, SÅ VIL B-RÆKKEN VÆRE LIDT MERE FOR AT FÅ NOGET HYGGELIGT SOCIALT SAMVÆR.

FM FOR HOLD BLIVER SPILLET OVER IALT 3 WEEKENDER I LØBET AF SÆSONEN.
**17-18 NOV 2001 , 2-3 FEBRUAR 2002 OG 16-17 MARTS 2002.**
A-RÆKKEN SPILLER OM LØRDAGEN OG B-RÆKKEN OM SØNDAGEN, BEGGE DAGE STARTES DER KL.14.00.
DET FOREGÅR I VORES NYE LOKALER I B-36 HUSET (INDGANG FRA PLÆNEN).
PRISEN FOR DELTAGELSE ER 300 KR PR. HOLD I B-RÆKKEN OG 450 KR I A-RÆKKEN.

TILMELDING SENEST ONSDAG D. 14 NOVEMBER 2001 OG BETALING I B-36 HUSET
D. 17 ELLER 18 NOVEMBER.

TLF.: 310501 ELLER E-MAIL henrik@post.olivant.fo

Dartsamband Føroya
v. Henrik Pedersen



**VETRARDEKK**

Allar støddir av vetrardekkum við ella uttan píkar á goymslu.

Ókeypis ásetan

**Ringi og fái meira at vita**

P/f AUTO-VULK
FO-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
223380
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR



**Wenty** *Skógvar*



***Støkk inn á gólvið ella ring tlf. 322676***

**Gå-let** *Tuflur*



**A. H. Jensen**
*alt innan reingerð*
Stoffalág 25 · tlf.: 322676 · fax: 318101
e-mail: a_jensen@post.olivant.fo



**Sosialurin**



**Lesið internet Sosialin !**






**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*



**ÍBýin**

*- hvønn hósdag*



Restorffs ASSU